UTTAN ÚR HEIMI

## Finnland í NATO

Finski forsetin, Tarja Halonen, avdúkar í einari nýggjari bók, at eftir hennara tykki fer innland at søkja um limaskap í verjusamgonguni NATO. Hon leggur tó dent á, at tað verður ikki enn, og hon ásannar, at tað ber til at tala fyri og ímóti finskum NATO-limaskapi.

Orð hennara benda á, at hon hevur broytt hugsan um NATO tey seinastu árini. Stutt eftir at hon tók við forsetaembætinum í 2000, fanst Tarja Halonen at verjusamgonguni, men seinni hon talað fyri samstarvi ímillum ES og NATO, og at finnlendingar eiga at gloppa dyrnar fyri NATO. Meiningakanningar hava eisini víst, at nógvir finnlendingar eru samdir við henni, skrivar blaðið Helsingin Sanomat.

Nógv bendir eisini á, at Tarja Halonen sleppur at halda fram í finska forsetasessinum. Tann seinasta kanningin vísti, at 61 prosent av veljarunum ætla sær at atkvøða fyri henni, so hon er langt framman fyri teir báðar avbjóðararnar, Matti Vanhanen og Sauli Ninistø, sum sambært kanningini kunnu fáa ávikavist 15 og 18 prosent av atkvøðunum.

## Ríkir russar fáa egnan bý

Býarmyndugleikarnir í Moskva hava gjørt av, at ein býlingur uttan fyri sjálvan býin skal skipast sum ein rættur ríkmannabýur.

Nógvir ríkmenn hava longu sett seg niður í býarpartinum Rubljovo Arkhangelskoje, men ætlanin er, at 30.000 fólk skulu búgva har. Økið er umleið tvær ferðir so stórt um fúrstadømið Monaco, men býráðið í Moskva roknar við, at tann nýggi býurin verður nógv ríkari enn tað gamla fúrstadømið, skrivar Dagsavisen. Fyribils er ætlanin, at tær bíligastu íbúðirnar skulu kosta eina hálva millión dollarar, og at tey dýrastu húsini skulu kosta fleiri milliónir dollarar.

Ein talsmaður fyri myndugleikarnar sigur við bretska blaðið The Times, at býurin skal byggjast í gomlum russiskum stíli, soleiðis sum Moskva sá út í zartíðini. Men byggistílurin verður eisini merktur av ávirkan úr gomlum evropeiskum býum so sum Amsterdam, Praha og München, sigur hann. Áin í Moskva fer tætt fram við býggja býnum, sum tí sjálvandi eisini skal hava eina havn til stuttleikabátar, leggur talsmaðurin afturat.

Tað fer neyvan at standa á at finna fólk, sum kunnu búseta seg í nýggja býnum, tí sambært teimum seinastu hagtølunum eru 33 fólk í Moskva, sum eiga meiri enn eina milliard dollarar, og í Russlandi eru 88.000 fólk, sum eiga meiri enn eina millión dollarar.

## Vitar til sølu

Nú ber til at ogna sær ein vita og eini vitameistarahús í Danmark, um ein hevur áhuga fyri tí.

Farvandsvæsenet, sum eigur vitarnar, hevur fyribils lýst tveir vitar og tvey vitameistarahús tilk sølu. Annar er á norðurendanum á oynni Langeland, og hin er Sletterhage-vitin á Djurslandi í Eysturjútlandi. Farvandsvæsenet roknar við at fáa 1,4 millión krónur fyri tann fyrra og 2,6 millión krónur fyri hin vitan og húsini.

Myndugleikarnir hava kortini tryggjað sær, at teir skulu hava atgongd til vitarnar, tí ætlanin er at brúka teir í fleiri ár afturat.

## Gróvu seg út

Júst sum í bókini "Tann stóra flýggjanin" hevur tað eydnast 19 fangum at grava seg út úr tí viðgitna Escuintla-fongslinum í Guatemala, skrivar AP.

Framferðin hjá fangunum var júst sum í teirri kendu skaldsøguni frá 1963. Teir gróvu ein 120 metrar langan tunnil, og leygardagin flýddu teir ígjøgnum tunnilin. Síðani hevur løgreglan leitað eftir teimum, men í gjár vóru bara tveir av fangunum tiknir. Løgreglan hevur ávarað fólk ímóti fangunum, sum sótu í fongsli fyri morð, neyðtøkur og burturflytingar, men løgreglan hevur illgruna um, at nakrir av vaktarmonnunum vistu um flýggjanina.

Bókin "Tann stóra flýggjanin" varð gjørd til film við Steve McQueen, James Garner og Richard Attenborough sum høvuðsleikarum. Myndugleikarnir í Guatemala ásanna, at fangarnir hava uttan iva brúkt bókina ella filmin sum fyrimynd.

# Fuglakrímið nærkast



*Í fleiri evropeiskum londum hava myndugleikarnir givið boð um at avlíva fugl. Hendan myndin er úr Rumenia*

Mynd: Reuters

**Í Bretlandi er ein pappageykur deyður av tí hættisliga slagnum av fuglakrími, í Russlandi eru fleiri dunnur deyðar, og í Noregi verður ein deyð álka kannað**

FUGLAKRÍM

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bretsku myndugleikarnir kunngjørdu sunnudagin, at ein pappageykur, sum var í búri, var deyður av tí slangum av fuglakrími, sum eisini hevur víst seg at vera lívshættisligt fyri fólk.

- Virusið er mest átøkt tí slagnum, sum varð funnið í dunnum í Kina fyrr í ár, men talan er ikki um tað slagið, sum er funnið í Rumenia og Turkalandi. Talan er um tað lívshættisliga virusið H5N1, men kortini eitt slag, sum vit ikki hava sæð fyrr, segði leiðandi djóralæknin hjá bretska umhvørvismálaráðnum, Debby Reynolds, við BBC.

Pappageykurin var komin úr Surinam í Suðuramerika og var í varðhaldi hjá eftirlitsmyndugleikunum saman við øðrum tropiskum fugli, tá hann doyði.

Samstundis hava russisku myndugleikarnir boðað frá, at teir hava nú staðfest tað vandamikla slagið av fuglakrími í tí evropeiska partinum av landinum. Frammanundan var sjúkan staðfest eystan fyri Uralfjøllini, men í gjár varð kunngjørt, at myndugleikarnir høvdu funnið H5N1-virusið í vevnaði av fimm høsnum, sum vóru deyð á einum bóndagarði í Tambov, sum er í landssynning úr Moskva.

Talsmaðurin hjá russisku heilsumyndugleikunum segði, at tólv høsn vóru deyð av sjúkuni, og at myndugleikarnir høvdu givið boð um at avlíva 53 dunnur og høsn, samstundis sum økið kring bóndagarðin varð avbyrgt.

Um vikuskiftið vórðu fleiri fuglar funnir deyðir nærhendis Kristiansand í Noregi. Teirra millum var ein álka, og myndugleikarnir gjørdu í gjár av at kanna, um hon var deyð av fuglakrími. Paul Stamberg hjá norsku heilsumyndugleikunum segði, at álkan kann vera deyð av einum slagi av fuglakrími, men at tað kortini ikki nýtist at vera tað slagið, sum er vandamikið fyri fólk. Úrslitið av norsku kanningini kemur ætlandi í morgin.

Í Makedonia og Kroatia eru fólk komin fram á deyðan fugl, men enn er ikki staðfest, um talan er um fuglakrím.

## 150 mill. mannalív

Í Keypmannahavn eru serfrøðingar komnir saman at viðgera støðuna og vandan fyri, at tað lívshættisliga slagið av fuglakrími kann breiða seg um allan heimin. Tað er heimsheilsustovnurin WHO, sum skipar fyri fundinum, ið hevur til endamáls at kanna, hvussu heimssamfelagið kann forða sjúkuni at breiða seg.

Umleið helmingurin av teimum, sum eru vorðin smittað við H5N1, eru deyð av sjúkuni, men tað stóra vandamálið er, um sjúkan fer at smitta ímillum fólk. So kann hon breiða seg um allan heimin, og serfrøðingar siga, at ein heimsumfatandi sjúka av hesum slagnum kann fara at krevja 150 milliónir mannalív.

# Veksandi ES-undirtøka í Noregi

**Tað er framvegis meirilutii ímóti norskum limaskapi í ES, men meirilutin minkar**

NOREG

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Norðmenn eru aftur í ferð við at nærkast ES. Ein nýggj meiningakanning, sum varð almannakunngjørd í gjár, vísti, at 46 prosent av teimum spurdu høvdu atkvøtt fyri limaskapi, var fólkaatkvøða um spurningin nú.

Ein meiriluti av norsku veljarunum hevur verið fyri ES-limaskapi tað seinasta árið, men støðan broyttist í summar, tá fransmenn og niðurlendingar vrakaðu uppskotið til eina ES-grundlóg. Tá vendu flestu norðmenn ES bakið, og í juni søgdu 59 prosent, at tey vóru ímóti limaskapi, meðan 41 prosent søgdu ja.

Men hendan gongdin er vend nú. Tann nýggja kanningin vísir, at nú siga 54 prosent nei, og 46 prosent siga ja. Samstundis vísir kanningin, at 9,2 prosent av teimum, sum atkvøddu nei á fólkaatkvøðuni í 1994, høvdu atkvøtt ja nú, meðan 11,5 prosent eru farin frá ja til nei.

Men spurningurin um norskan limaskap í ES kemur neyvan upp á tal tey næstu fýra árini, tí tað hevði kostað nýggju stjórnini lívið.